## Í Býin

# Botnurin verður lagdur á Manhattan



**Manhattan pub í Sverrisgøu í Havn er vorðin eitt av væl umtóktu støðunum í býarlívinum í Havn. Hetta er helst eisini tað staðið, ið líkist mest einari veruligari pubb í høvuðsstaðnum**

UMMÆLI

*John Johannessen*

Skeinkistøðini eru vorðin alsamt fleiri í føroyska høvuðsstaðnum seinastu árini.

Eitt av nýggjastu skeinkistøðunum er Manhattan pub, sum liggur upp at Matstovuni Rio Bravo í Sverrisgøtu. Á jólum hevði hetta skeinkistað eitt ár á baki.

Manhattan er eitt snotuligt skeinkistað, sum eigarin hevur givið undirheitið pub. Hetta undirheitið hevur staðið helst uppborið, tí tað er í øllum førum tað staðið í høvuðsstaðnum, ið best kann samanberast við eina bretska ella skotska pubb.

Innbúgvið í Manhattan er ógvuliga snotuligt Tað skapar eitt umhvørvi, sum fær teg at kenna teg væl sum gest. Eisini er pláss fyri tónleikarum, og eitt klaver stendur í einum króki, eins og á frægu pubbunum úti í heimi.

### Leggja botnin

Ein fyrimunur við Manhattan er, at tað liggur beint upp at matstovuni, Rio Bravo, við beinleiðis inngongd í matstovuna.

Hetta gevur tær eitt frálíkt høvi at fáa eina kalda øl ella ein góðan sjuss niðurundir matin, meðan tú bíðar efir borði inni á Rio Bravo.

Eisini er skjótt og lætt at koma úr aftur matstovuni og inn í pubbina, um tað er vikuskifti og tú kanst loyva tær eina øl ella ein góðan viski oman á matin, áðrenn farið verður víðari til dans ella bara heim at sova.

Eftir mínum tykki er hetta, umframt Café Natúr, frægasta staðið at leggja botnin, skalt tú út at mála høvuðsstaðin reyðan.

### Ov nógvur larmur

Eitt, sum eyðkennir nýggj føroysk skeinkistøð, er ov harður tónleikur. Hetta er eisini galdandi fyri Manhattan.

Tá eg fari ein túr út at drekka mær eina øl ella báðar tvær, dámar mær væl at sita við eitt borð í hugnaligum umhvørvi og práta við fólk. Men ofta bert hetta ikki til. Og orsøkin er einføld. Dundrandi tónleikurin ger, at tú ikki hoyrir, hvat tann yvirav tær sigur.

Tað er fleiri ferðir komið fyri, at eg havi vent við aftur í durunum á Manhattan, eins og ørðum skeinkistøðum í Havn, tí eg ikki havi tímað inn fyri larmi.

Tað er frálíkt, at skeinkistøðini borðreiða við eitt sindur av mentan umframt rúsandi løgin. Men tað kann ikki vera meingingin, at oyruni skulu blásat út, um tú ætlar tær at fáa eina góða øl í hugnaligum umhvørvi.

Harði tónleikurin hóskar væl í konserthøllum og í ymsu dansistøðunum, men ikki í smærru skeinkistovunum...




